# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Regn og skriðjulop órógvaði ferðsluna

**Nógvur kavi eftirfylgt av grovum regni meginpartin av náttini órógvaði sjálvandi ferðsluna fleiri staðni í morgum. Ringast var í Kollafjarðardali, Kaldbaksfirði, Leynum, Skælingi og á Vatnsoyrum**



*Óneyðugt er at staðfesta, at nógv vatn var á vegnum her í Kollafjarðardali í morgum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

TOYBIL
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Arbeiðsferðslan var nógvastaðni órógvað millum klokkan sjey og átta í morgum, áðrenn grankýrnar hjá Landsverk høvdu ruddað vegirnar fyri krapa og skriðjulop. Serliga var tað í Kollafjarðardali og sunnanfyri Kaldbakstunnilin, at grimdaregn saman við bráðnaða kavanum elvdi til trupulleikar av tiptum áum.

Løgreglan hevur ikki fingið fráboðan um nakran skaða- bert seinkingar. Røðin av bilum í Kaldbaksfirði gekk langt inn í tunnilin úr Kollafirði.

Um áttatíðina var koyrandi aftur á hesum strekkinum, sigur Regin Árting frá Landsverk, sum vísir á, at ein afturvendandi trupuleiki fyri teir, ið rudda, er, at bilarnar koyra ov nær upp ímóti gravkúnum.

– Hetta er óheppið, tí tað seinkar ruddingini. Eisini undir vanligum kavagrevstri, sigur Regin Árting.

Ongin stórvegis materiellur skaði er hendur, uttan á Vatnsoyrum, har krapi og mold er skolað oman í bygdina. Sagt verður av Vatnsoyrum, at sjálvt um talan verður um nógv at rudda burtur, so hevur onkuntíð fyrr verið størri materiellur skaða enn hesaferð. Tó hevur kjallarin í einum nýístandsettum húsum fingið skaða, tí nógv vatn var runnið inn.

Í Leynum og Kvívík hava brandmenn hjálpt til við at leiða vatnið burtur. Aðrir vegir, ið hava verið darvaðir av krapa og skriðjulopi er Vesmannavegurin, Selatræðsvegurin, Eiðisvegurin, Hovsvegurin og Skælingsvegurin, sum ikki var opin fyrr enn um 10-tíðina fyrrapartin.



*Vatsnoyrar er ivaleyst tað plássið, har mest vatn, krapi og skriðja er skolað oman yvir bygdina*

*Mynd: Anna Jacobsen*





*Tað tók okkurt um ein tíma hjá maskinunum hjá Landsverki at rudda vegin sunnanfyri Kaldbakstunnilin aftan á skriðjulopið, sum nógva regnið í nátt elvdi til*

*Mynd: Jens Kristian Vang*